# R TRYGDINI



**BÍÐA ENN**

*- Eg havi næstan mist mótið um, at nakað fer at henda við ferðslutrygdini her í bygdini, sigur Una Simonsen, sum býr Norðuri í Sundum í Kollafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sligið verður enntá fast, at samanbindingarnar av býlingum við bygda- og landsvegin eru sannar deyðsfellur.

Tey eru vitandi um, at fleiri ferðsluóhapp hava verið í bygdini. Tey ynskja tí, at okkurt verður gjørt soleiðis at ein kann sleppa undan enn fleiri sorgarleikum.

Onnur vísa eisini á tað sjáldsama, at Kollafjørður man vera ein av teimum fáu størru bygdunum, har ongar bungur eru. Tað plagar ofta at vera skjótt frá orð til gerð, tá talan er um at gera bungur aðrastaðni.

## Ov nógv ferð

Ein fríggjadag seinast í november mánaði 2006 var so dagurin komin, tá hesar undirskriftirnar skuldu handast borgarstjóranum í Havn, Heðin Mortensen ið jú eisini er teirra borgarstjóri.

Undir handanini vístu tey á, at tey høvdu gingið hurð av hurð í bygdini og høvdu heitt á fólk omanfyri 18 ár at skriva undir.

Fleiri hava stríðst fyri at bøta um ferðslutrygdina í bygdini í mong ár, men ikki fyrrenn nú eru líkindi fyri at okkurt munagott fer at henda.

- Fólk hava stuðlað okkum øgiliga væl, ikki minst tí at tey sjálvi hava følt seg nærum hjálparleys í hesum máli.

- Serliga er hetta galdandi fyri tey eldru, sum illa tora út at ganga sær ein túr, tí ferðslan er so nógv, varð sagt undir framløguni.

Tey vístu samstundis á, at talið á bilum sum koyra eftir bygdarvegnum er eitt mál. Eitt heilt annað er ferðin, sum ikki altíð samsvarar umstøðunum at koyra eftir.

> **Vit vilja í øllum førum ikki sita hendur í favn, og bara bíða eftir næsta ferðsluóhappinum**

## Ikki hendur í favn

Stigtakararnir hava merkt sær, at ferðslan í bygdini er nógv økt hesi seinastu árini. Einki er heldur sum bendir á, at hon fer at minka framyvir.

Í Kollafirði eru hendar stórar útbyggingar, m.a. á havnarlagnum, við skúlan, eins og tveir barnagarðar eru komnir tey seinnu árini, eins og eitt nýtt læknaviðtaluhøli kemur í næstum.

Haraftrat er ítróttarhøllin komin, og tí er nógv sum bendir á, at trupulleikin og óttin í fólki bara fara at vaksa samsvarandi í framtíðini. Nógv velja at koyra og heinta børnini við bilum sínum, tí tey snøgt sagt ikki tora at ganga eftir bygdavegunum.

Hetta ger jú bara tað, at tað verða uppaftur fleiri bilar á vegnum.

- Vit vilja í øllum førum ikki sita hendur í favn, og bara bíða eftir næsta ferðsluóhappinum, siga tey.

*snorri@sosialurin.fo*

# Koyra varliga í Líðini

Bert smávegis ítøkilig stig eru tikin fyri ferðslutrygdina í Kollafirði.

Kortini kann staðfestast, at bilførarar yvirhøvur eru ansnir í ferðsluni. Tað benda í øllum førum teljingar á, sum Tórshavnar kommuna gjørdi á trimum støðum í Kollafirði í oktober mánaði 2009.

Hesar tríggjar ferðsluteljingarnar vóru gjørdar í nánd av trimum ávísum sethúsum á vegastrekkinum, sum kallast "Í Líðini" - tað er: fyrsti innkoyringarvegur á niðaru síðu eftir havnarlagið.

Teljing 1 varð gjørd Í Líðini nr. 5: Miðalferðslan um samdøgrið var 469 bilar, hvørs miðalferð var 42 km/t

Teljing 2 varð gjørd Í Líðini nr. 47: Miðalferðslan um samdøgrið var 571 bilar, hvørs miðalferð somuleiðis var 42 km/t

Teljing 3 varð gjørd Í Líðini nr. 85-87: Miðalferðslan um samdøgrið var 652 bilar, hvørs miðalferð var 38 km/t.

Fyri kollfirðingar er gott at kunna staðfesta, at allar flestur bilarnir koyrdu spakuligari enn máldu miðalferðina.

**sb.**